# Vælkomin á Sum




Nógv pláss eru sett av til smábátar, ið ætla sær á Summar Festivalin

*Summar Festivalurin hevur øll árini verið ein hugnaligur og góður festivalur. Hetta kemst fyrst og fremst av, at fólk taka so væl undir við festivalinum og skikka sær fyrimyndarliga væl. Hetta vóna vit eisini, at fólk gera í ár.*

*Her á síðuni eru upplýsingar um nakað av tí, ið fer fram á festivalinum. Á festivaløkinum verður eisini kunningardiskur, sum fólk kunnu venda sær til, um tey hava okkurt at spyrja um.*

*Vælkomin á Summar Festival*

## Armbond

Øll, sum skulu inn á festivaløkið, skulu hava armband uppi á. Atgongumerkini, sum verða keypt í forsølu, verða býtt um við armbond undan festivalinum. Armbond verða sjálvsagt koyrd upp á við dyrnar, men vilt tú sleppa undan at standa í kø til Scorpions ella aðrar bólkar so kanst tú eisini koyra armbandið uppá í góðari tíð.

Armbond fáast á hesum støðum frá mikudegnum 1. august:
Telebúðin, Havn
Telebúðin, Klaksvík
J.A.P., Klaksvík

Biðið verður um samleikaprógv, um ivamál eru, um ein persónur er 18 ár ella ikki.

## Bussar

Skipað verður fyri eyka bussambandi á Summar Festivalinum. Strandferðslan koyrir sum vanligt um dagin, og á nátt verða eyka bussar settir inn til teirra, sum vilja sleppa heimaftur. Bussarnir koyra frá parkeringsøkinum við KÍ-høllina. Samband verður til Eysturoynna, Havnar, Vestmanna og Vágarnar. Bussarnir koyra soleiðis:

| | |
|---|---|
| Hóskvøldið: Kl. 03.00. | Bílegging: |
| Fríggjakvøldið: Kl. 05.00 | Eysturoy og Havnar: Tlf. 505220 |
| Leygarkvøldið kl. 05.00 | Vestmanna og Vágar: Tlf. 424254 ella 217752 |

## Prísir

Vikuskiftispass til Summar Festivalin hava hesar prísir:

Fram til hósdagin 2. august kl. 18.00: 895 kr.
Eftir hósdagin 2. ausgust kl. 18.00 og við dyrnar: 995 kr.
Barnapass (5-13 ár): 200 kr.
Børn undir 5 ár sleppa ókeypis inn

## Myndatól

Nú ganga øll fólk við myndatóli í lummanum ella á fartelefonini, og hesi myndatól kunnu fólk taka við sær á festivalin. Tað kunnu tó verða onkrar treytir um myndatøku í sambandi við ávísar framførslur, og hesar treytir skulu virðast. Myndatól í professionellari góðsku kunnu bert takast inn á festivaløkið, um skráseting er gjørd frammanundan.